## Stjørnurnar tosa ikki saman

Tvær av stóru stjørnunum í spanska fótbóltsfelagnum FC Barcelona tosa als ikki saman, og tað sæst eisini aftur á vøllinum, at teir ikki sita væl um sett. Tað søgdu tveir viðmerkjarar í svenskum sjónvarpi um vikuskiftið um forholdið millum Zlatan Ibrahimovic og Lionel Messi. Viðmerkjararnir siga, at Messi kennir seg hóttan av Zlatan, sum hevur gjørt tað sera gott, síðani hann kom til felagið at spæla. Í gjárkvøldið skoraði Zlatan sigursmálið í stórdystinum ímóti Real Madrid.




## Grønkjær sum 60 ára gamal

Venjarin hjá danska fótbóltsfelagnum FCK heldur, at harða leikskráin hjá hansara spælarum sæst aftur, og hann heldur, at spælararnir nú hava brúk fyri vetrarferiu. FCK hevur verið í Europa League, liðið spælir nógvar dystir í heimligu kappingini, og summir spælarar eru við á landsliðum eisini.

- Tað sær út, sum nógvir av spælarunum eru troyttir nú, og spurningurin er, um vit hava orku til allar hesar dystir. Jesper Grønkjær líkist til dømis einum 60 ára gomlum manni at enda í dystinum í dag, segði Ståle Solbakken.

## Norðurkorea bannar HM í fótbólti

### Hóast landið tekur lut í HM-endaspælinum, so verður eingin dystur vístur beinleiðis í norðurkoreanskum sjónvarpi




Heri Simonsen

Tey sum ikki dáma fótbólt eiga at umhugsa at fara til Norðurkorea komandi summar.

Norðurkoreanski einaræðisharrin, Kim Jong-il hevur nevnliga givið almenna sjónvarpsmonopolinum í Norðurkorea bann fyri at senda dystir beinleiðis frá HM-endaspælinum í Suðurafrika komandi summar.

Eitt lítið undantak kann tó koma fyri. Vinnur Norðurkorea sínar dystir, so fer norðurkoreanska sjónvarpsmonopolið at vísa hæddarpunkt frá dystunum hjá Norðurkorea.

Boðini frá Kim Jong-il hava við sær, at 99% av teimum 29 miljónunum, sum búgva í Norðurkorea fara ikki at vita hvussu HM endar, uttan so, at Norðurkorea ger eina risasensasjón og vinnur HM í fótbólti.

Kemur tað í heila tikið uppá tal at vísa dystir hjá Norðurkorea í sjónvarpinum, so fer tað at vera klipt soleiðis, at hyggjarin fær eina fatan av, at Norðurkorea er tað besta liðið á vøllinum.

Bretska blaðið "Daily Telegraph" skrivar, at Norðurkorea vil ikki gjalda fyri sjónvarpsrættindini. Tað er sannlíkt, at kommunistisku, norðurkoreonsku valdsharrarnir fara at taka myndir frá suðurkoreanskum sjónvarpi, um talan verður at brúka nakað sum helst tilfar frá HM-endaspælinum.

Meirilutin av fólkinum sleppur kanska at síggja nøkur fá einvegis hæddarpunkt. Tap hjá norðurkoreanska landsliðnum fara at vera tagd burtur, og í besta føri vera tey nevnd í onkrum stubba í teimum almennu bløðunum.

# Messi er stórfavorittur

### Í annaðkvøld verður vinnarin av gylta bóltinum frá France Football avdúkaður. Talið av kandidatum er nú skorið niður í 10




Jákup Mørk




Lionel Messi úr Barcelona er stórfavorittur til heitið sum besti fótbóltsspælarin í Europa í 2009

Tað er eingin ivi um, at Lionel Messi úr Argentina og Barcelona er stórfavorittur at vinna heitið sum ársins spælari í Europiskum fótbólti.

Bóltstnillingurin var í ár við til at vinna the Treble hjá Barcelona, og umframt støðugt stórspæl frá hansara síðu, so var hann eisini maðurin, sum við vøkrum stútari skoraði til 2-0 í Champions League-finaluni ímillum Barcelona og Manchester United.

Skal Messi fáa nakra kapping í atkvøðugreiðsluni hjá France Football, so skal hetta helst vera Cristiano Ronaldo. Vinnarin av gylta bóltinum í fjør hevur ikki vunnið eins nógv steyp hetta seinasta árið, men hann gjørdist í summar heimsins dýrasti spælari, og í Real Madrid hevur hann alt fyri eitt víst seg sum sannan fong.

Tað eru ítróttarjournalistar úr Europa, sum greiða atkvøðu um gylta bóltin. Hvørt UEFA-limaland hevur eitt umboð, og hvørt av hesum umboðunum skal seta sín egna top-5 saman.

Upprunaliga kundu journalistarnir vilja millum 30 nøvn, men nú handan stendur fyri framman, hevur France Football avdúkað, hvørjir teir 10 ovastu eru. Umframt Messi og Ronaldo eru hesir Didier Drogba, Samuel Eto´o, Steven Gerrard, Zlatan Ibrahimovic, Andres Iniesta, Kaka, Wayne Rooney og Xavi.

Á upprunliga top-30 listanum vóru eingir italiumenn ella týskarar, og nú listin er skorin niður í 10, er heldur eingin fraklendingur á listanum. Karim Benzema, Yoann Gourcuff og Franck Ribery vóru annars á upprunaliga listanum.

Tað er europiska ítróttapressan, sum við einum umboði fyri hvørt land greiðir atkvøðu um, hvør skal taka ímóti gylta bóltinum.

# Finna sterkasta mannin í juni

### Kappingin um at finna sterkasta mannin í Føroyum verður hildin í juni mánaði í 2010




Jákup Mørk

Tað var ein brakandi succés í oktober mánaði, og nú er gjørt av, at kappingin um at finna Føroya sterkasta mann verður hildin aftur í juni mánaði



Tað hepnaðist framúr væl, tá menn í oktober mánaði kappaðust um, hvør skuldi fáa heiðurin at verða róptur sterkasti maðurin í Føroyum.

Mest sum alt fyri eitt gjørdu fyrireikararnir av, at tiltakið skuldi endurtakast, og nú eru fyrireikingarnar til hetta komnar somikið væl áleiðis, at tað liggur fast, at hetta verður í juni mánaði.

- Endaliga dagfestingin er ikki ásett enn, men tað verður so í juni. Vit vóru púrasta ovfarnir av áhuganum seinast, har vit fingu fulla høll, hóast fótbóltslandsdystur, Jákup Veyhe-show og ymiskt annað fór fram sama kvøld.

- Tí hava vit eisini tosað um møguleikan at hava tiltakið uttandura, men tað ber illa til at rokna við veðrinum í Føroyum, so tað verður undir taki í Ítróttarhøllini á Hálsi aftur í ár, sigur Bogi Hammer, sum er ein av fyriskiparunum.

Hann sigur víðari, at leisturin, sum kappingin verður skipað eftir, verður á leið tann sami, men at talan sjálvandi verður um at variera onkra av kappingargreinunum nakað.